# Aksel er til reiðar at ve

**AKSEL TIL VERKA** Vit skulu avgjørt ikki vinna næsta løgtingsval fyri einhvønn prís, tí vit skulu eisini tora at hyggja veljaran í eyguni dagin eftir valið, sigur nýggi formaðurin í Javnaðarflokkinum

Áki Bertholdsen

- Nú havi eg bjóðað meg fram og tað merkir, at eg eri til reiðar at fara allan vegin.

Tað staðfestir nývaldi formaður Javnaðarfloksins, Aksel V. Johannesen.

Á eykaandsfundi í Javnaðarflokkinum leygardagin varð hann valdur til nýggjan formann við stórum meiriluta, eftir at Jóannes Eidesgaard hevur gjørt av at takka fyri seg.

Men nú er Aksel V. Johannesen ikki bara formaður í Javnaðarflokkinum. Hann er eisini valevni floksins til ein nýggjan løgmann, skuldi flokkurin komið í eina samgongu.

Og mong hava reist spurningin um hann er búgvin til ta uppgávuna, tí royndirnar í politikki eru avmarkaðar við tað, at hann hevur bara hálvtannað ár sum virkin politikkari undir beltinum.

Hann kom nevniliga ikki av álvara upp í politikk, fyrrenn hann bleiv landsstýrismaður í Heilsumálum tá ið Hans Pauli Strøm legði frá sær fyri góðum hálvum øðrum ári síðani.

Men sjálvur skúgvar hann allan iva til viks.

- Sjálvandi eri eg til reiðar at verða løgmaður. Eg havi bjóðað meg fram at verða formaður floksins og í tí liggur, at eg eisini eri løgmansevni floksins og tað eri eg fullgreiður yvir, sigur hann.

Hann leggur eisini dent á, at eftir næsta løgtingsval, fer Javnaðarflokkurin sjálvandi at royna at koma í eina samgongu.

- Endamálið við politikki er altíð at fáa ávirkan, so vit fara sjálvandi at royna at koma í samgongu.

- Vit vita, at enda vit í samgongu, verða vit noydd at gera neyðsemjur og ber tað til at finna eina semju, uttan at ganga okkara kjarnuvirðum ov nær, eru vit til reiðar, sigur hann í morgun, sum er hansara fyrsti veruligi arbeiðsdagur, sum floksformaður.

### Ikki treytaleyst

Hann leggur afturat, at ein av nógvum stórum uppgávum, ið liggja fyri framman, verður at vinna næsta løgtingsval.

- Men tað skal ikki verða treytaleyst, tí vit mugu ikki missa okkara kjarnuvirði burtur og vit skulu eisini tola sjónina av okkum og tora at hyggja veljaran í eyguni eftir vali.

Í hesum sambandi hugsar hann mest um, at flokkurin skal vera trygdin fyri, at vælferðartænasturnar í samfelagnum ikki detta sundur.

- Okkara mál skal framvegis verða at teljast ímillum teir fýra stóru flokkarnar, men prísurin skal ikki verða, at tað samhaldsfasta samfelagið dettur sundur og vit skulu eisini hugsa longur fram enn til næsta løgtingsval.

### Samríkjaflokkur

Og so staðfesti nýggi formaðurin eisini, at Javnaðarflokkurin er ein samríkjaflokkur, sum ikki setir vælferðina í vanda í strembanini eftir sjálvbjargni.

Men hví er tað yvirhøvur neyðugt at minna fólk á, at Javnaðarflokkurin er ein samríkjaflokkur? Hevur tað nakrantíð verið eitt ivamál?

- Í mínari verð hevur tað ongantíð verið eitt ivamál, men summi hava gjørt tað til eitt ivamál, so hetta er bara ein staðfesting av støðuni.

Er hetta fyri at tryggja tykkum, at tey sambandssinnaðu javnaðarfólkini verða verandi í flokkinum og ikki stinga av yvir í Sambandsflokkin

- Nei, hetta er fyri at staðfesta, at soleiðis hevur tað altíð verið og soleiðis fer tað at verða verandi, sigur Aksel V. Johannesen.



**LØGMAÐUR**

*Eg havi bjóðað meg fram at verða formaður Javnaðarfloksins og tað ber eisini í sær, at eg eri løgmansvalevni floksins. Men tað eri eg greiður yvir og til reiðar at vátaka mær, sigur Aksel V. Johannesen*

# Aksel vil hava tey ríku at

**SAMHALDSFESTI** Sleppa tey ríku ov lætt, noyðast hini bara at rinda meir og tað eru politiskir spurningar, sum nýggi formaðurin í Javnaðarflokkinum ætlar at seta á dagsskrá

Áki Bertholdsen

Hvussu nógv skulu tey við góðari løn, rinda til okkara felags samfelagsliga húsarhald og, hvussu nógvar byrðar skulu leggjast á tey við lágari løn?

Hetta er ein spurningur, sum Aksel V. Johannesen, nývaldur formaður í Javnaðarflokkinum ætlar at seta á dagsskrá.

Hann leggur stóran dent á at geva hugtakinum um tað samhaldsfasta samfelagið eitt veruligt innihald.

Í hesum sambandi ætlar hann at seta fleiri mál á dagsskrá, sum flyta nógv gjøld frá teimum lægri løntu yvir á teir breiðaru herðarnar, sum orka betri at bera.

Tað staðfestir hann, nú vit fingu orðið á hann í morgun, beint áðrenn hann fór undir sín fyrsta arbeiðsdag sum nýggjur formaður í Javnaðarflokkinum.

### Rentustuðulin skerjastt

Í hesum sambandi hugsar hann um rentustuðulin til sethúsaeigarar. Men hann hugsar samstundis um skattafrádráttin til fiskimenn, um skattaviðurskiftini hjá teimum, sum arbeiða undir nettoskattaavtalum og hann hugsar tilfeingisgjald.

- Í løtuni ber til at fáa stuðul av rentum upp til 150.000 krónur og tað svarar til eitt húsalán upp á yvir tríggjar milliónir.

- Men tað er ikki rímiligt, at fólk, sum byggja so stór og dýr hús, framvegis skulu fáa fullan rentustuðul.

Hann sigur, at tað er ikki rímiligt, at tey, sum byggja eini hús, sum eru yvir miðal, fáa fullan rentustuðul til tað, tí vit eru øll felags um at rinda hendan rentustuðulin, eisini vanligir løntakarar og stakir uppihaldarar.

### Dagstuðul til fiskimenn

Aksel V. Johannesen heldur eisini, at skattafrádrátturin til fiskimenn er órættvísur.

- Er tað rímiligt, at ein fiskimaður, sum er við einum góðum báti og forvinnur 500.000 krónur um árið, skal hava størri skattafrádrátt enn ein, sum forvinnur 300.000 krónur, hóast báðir eru líka nóvar dagar í sjónum, spyr nýggi Javnaðarformaðurin.

Hann vísir á, at ein grundgeving fyri frádráttinum er, at fiskimenn er burtur heimanífrá og ikki fáa tikið lut í samfelagsins tilboðum á jøvnum føti við heimafólk.

Tí heldur hann, at ein rættvísari skipan hevði verið at latið ein ávísan frádrátt fyri hvønn dagin, ein fiskimaður varð burtur, heldur enn at frádrátturin er 15% av hýruni, sum hann er í dag.

Hann sigur, at hann er farin at kanna um hetta er ein skipan, sum tað ber til at seta í verk, tí hann heldur, at frádrátturin skal ikki vera treytaður av hýruni men heldur av, hvussu nógvar dagar, ein er til skips.

Nýggi formaðurin spyr eisini um tað er órímiligt, at krevja eitt skynsamt tilfeingisgjald frá teimum,